# Mentanarnátt í Havn




*Nógv tiltøk og nógvar framsýningar vera á skránni, tá mentanarnátt verður í Havn fríggjakvøldið*

Mentanarnátt er blivið eitt afturvendandi tiltak, og í annaðkvøld, 1. juni, verður mentanarnátt aftur á skránni í Havn. Her vera nógv ymisk tiltøk á skránni.

Fólk hava fyrr havt møguleika at vitja í Skansapakkhúsið, tá mentanarnátt hevur verið, og henda møguleika fáa tey aftur í annaðkvøld. Tá verður nevniliga skipað fyri rundvísing í Skansapakkhúsið.

Vanliga hevur eisini verið skipað fyri rundvísing úti á Tinganesi, og hetta verður aftur á skránni hesaferð. Fólk fáa møguleika at síggja nakað nýtt, tí Reynagarður er júst settur í stand, og hesin fer at vera karmur um rundvísingina úti á Tinganesi. Umframt túrin úti á Tinganesi kunnu fólk eisini fara túr í Vesturbýnum og oman eftir Tinghúsvegnum, har ferðaleiðari verður við.

Tað vera eisini avbera góðir møguleikar at keypa henda dagin, tí handlarnir í høvuðsstaðnum hava opið líka til kl. 23.

Annars vera nógv tiltøk og nógvar framsýningar á skránni henda dagin. Dansur, sangur og konsertir vera eisini á ymsum støðum runt í býnum, so har verður nokk at fara til á mentanarnáttini í annaðkvøld. Eitt av teimum heilt góðu tingunum við mentanarnáttini er eisini, at tiltøkini ikki kosta nakað.


Buksuvadmál
1. floks
toy til skjúrt,
bæði til børn
og vaksin.
Toy til møttil
og fóður
Buksuvadmál Pr. metur 698,-
Skálabúðin
Dr. Jakobsensgøta 21
Tel 31 53 15


Sightseeing.fo
- Bird Cliffs & Cruises...
Sightseeing túrar eystur undir land
...og kring allar Føroyar

Njót náttúruna við klettum, holum og fuglalívinum við Vestmannabjørgini. Vit sigla inn í djúpar holur og millum lodrøtt fuglabjørg og tætt millum bogar og sker.
Um tú vilt uppliva nakað serstakt - royn so ein túr við einum av okkara bátum.
Trygdin er í hásetri og manningin hevur góðar royndir og nógv ár á baki.
PALLI LAMHAUGE
Tel. 424155 - fax 424383
sight@sightseeing.fo
www.sightseeing.fo

Blómuhandilin
Summardáin

N. Pálsg. 16, Klaksvík
Tlf 456193 • Fax 457193

Vælkomin á HOTEL NORÐ
- 15 dupultkømur
- Matstova til 250 gestir
- Fundarhøli
- Barr
- Náttúruvakurt
- Buss til hurðina


FO-750 Viðareiði · Tel 45 12 44 · Fax 45 12 45
hotel@hotelnord.fo · www.hotelnord.fo

Kom sum Aladdin
flúgvandi til Klaksvíkar
Tyrlan flýgur Tórshavn – Klaksvík

Mánadag 8.12
(bert juni, juli, august)
Mikudag 13.04
Fríggjadag 13.00
Sunnudag 13.52
Norðoya Kunningarstova · Varpabrúgvin 1 · 700 Klaksvík
Tlf 456939 · Fax.456586 · info@klaksvik.fo

NÚ BYRJAR SØLAN
AV TRØÐUM & RUNNUM

Vakstrarhúsið Dáin
Upplatingartíðir
Mánad. - fríggjadag. 10 – 17.30
Leygardag 10 – 14.00
Sandavágur • Tlf. 33 23 64
dain@post.olivant.fo



OPEL
Opel Antara Elegance 2,4i 4x4
Prísur úr 339.000 kr.
PEUGEOT OPEL SAAB NISSAN
Auto Service
www.autoservice.fo